TACC 2008

# Klima-ráðstevnan skal vekja politikarar



**- Keyparar og brúkarar av føroyskum vørum krevja burðardygga framleiðslu. Men vinnan kann ikki sjálv taka røttu stigini, og hungrar eftir greiðum politiskum leiðreglum, sigur Ólavur Gregersen, samskipari av veðurlagsráðstevnuni TACC**

VEÐURLAGS-RÁÐSTEVNA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Aftaná eina uppiborna páskahalgu, hava fyrireikararnir nógv um oyrini, nú setanin av stóru veðurlagsráðstevnuni í Norðurlandahúsinum av álvara nærkast longu 7. og 8. apríl í ár. Ráðstevnan, sum hevur fingið heitið Trans Atlantic Climate Conference, stytt: TACC, hevur tvey endamál: At seta fokus á veðurlagsbroytingar, við serligum atliti til havumhvørvið, umframt at kunna um ætlanirnar at seta á stovn ein transatlantiskan granskingarstovn, TACIT – TransAtlantic Climate Institute.

Stigtakari er Bitland, meðan Vinnuhúsið, Samvit og Nora eru medfyrireikarar.

### Vitja Miðlahúsið

Tey bæði, Ólavur Gregersen, samskipari frá Bitland, og Tórunn Ellingsgaard, tíðindasamskipari, hava lagt leiðina framvið Miðlahúsinum í morgun, at greiða frá um fyrireikingarnar. Tey vita at fortelja, at atgongumerkjasølan gongur væl, hóast tað ikki er útselt enn.

- Vit hava selt eini 200 atgongumerki higartil. Skráin verður helst liðug í morgin, og tá ið hon er almannakunngjørd, rokni eg við, at fleiri fara at tekna seg, sigur Ólavur Gregersen. Fyrireikararnir hava roknað við eini 200-300 luttakarum, einamest granskarar, vinnulívsfólk, politikarar og miðlar. Seinni dagurin á ráðstevnuni er býttur upp í fýra workshops, ella verkstovur, har til ber at tekna seg til tvær og tvær.

Nú evnið eru altjóða veðurlagsbroytingarnar, er ætlanin bæði at lýsa støðuna, sum hon er, umframt at varpa ljós á, hvat okkara partur í Atlantshavi er, og hvussu kunnu vit vera við til at broyta óhepnu gongdina.

Bakgrundin fyri at skipa slíka ráðstevnu júst í Føroyum er, at her er servitan á altjóðastøði um havstreymar kring Norðuratlantshavið, og Føroyar hava sum fiskiveiðitjóð nógva vitan um veður og tilfeingi í havinum.

### Viðurkendir røðarar

Ráðstevnan er fyrst og fremst eina vinnu – og granskingarráðstevna. Sostatt er høvuðsmálið enskt, og fleiri av teimum 30 fyrilestrarhaldarunum eru altjóða viðurkendir og víðagitnir granskarar. Umframt sjálvandi høvuðsnavnið: fyrrverandi amerikanska varaforsetan og umhvørvisstríðsmannin Al Gore, sum verður mettur at vera millum teir 20 best umtóktu fyrilestrarhaldararnar í heiminum.

Al Gore hevur seinastu árini dúgliga gjørt vart við vandarnar, sum standast av veðurlagsbroytingum. Fyri hetta arbeiðið fekk hann í 2007 Nobel-friðarheiðurslønina saman við vísindafólkum hjá ST. Hansara sjónarmið er, at øll lond og allir einstaklingar eiga at taka ábyrgd á økinum, tí jarðarupphitingin hevur vanlukkuligar avleiðingar við sær.

### Ikki bara moralur

Ólavur Gregersen og Tórunn Ellingsgaard greiða frá, at tað eru fleiri orsøkir til, at vit føroyingar eisini noyðast at fyrihalda okkum til alheims veðurlagsbroytingarnar – ikki bara útfrá einum moralskum og etiskum sjónarhorni.

- Men eisini, tá tað snýr seg um sølu og marknaðarføring, har tað í alt størri mun verður væntað av okkum, at vit kunnu dokumentera, hvussu vøran er veidd og framleidd, sigur Ólavur Gregersen. Tí vóna tey, at eitt umboð fyri risastóru handilsketuna Tesco kemur at greiða frá um meginbrúkaran, sum í alt størri mun krevur innlit í og prógv fyri, at framleiðslan fer fram á burðardyggum grundarlagi

# Slóbrótandi grønir



*Dánjal Jákup Jacobsen, Jóan Petur Petersen og Ólavur Simonsen eru menninir handan fyritøkuna Decision 3 og skipanina GreenSteam. Skipanin, sum teir hava ment, hevur vakt altjóða ans, tí hon kann spara skipum milliónir í oljuútreiðslum*

**Tríggir ungir granskarir hava ment eina skipan, sum kann gera tað møguligt fyri skipavinnuna at spara bæði umhvørvi og milliónir av krónum. Eitt lítið hugskot á Fróðskaparsetrinum er í dag ment til eitt kollveltandi føroyskt produkt á veg út á altjóða marknaðin**

GRØN VINNA

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Ein av føroysku fyritøkunum, sum verður við á TACC08 ráðstevnuni er Decision 3. Sosialurin hevur verið á gátt hjá nýggju føroysku fyritøkuni, sum fyri stuttum undirskrivaði sáttmála við stóra danska reiðaríðið, Norden.

Tað er einki skilti uttanfyri, sum sigur at her heldur ein spennandi granskingarfyritøka til. Inngongdin er væl fjald á ovasta trini á nøkrum væl fjaldum bakgarðstrappum í miðbýnum í Havn.

Ein passandi fasada fyri eina fyritøku, sum má halda sína gransking so dulda sum møguligt fyri at tryggja, at eingin annar fer avstað við produktinum.